# TILTØK

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag kl. 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 18. mars:*
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
10.15-18 Vit mála. Kortspæl, telving og onnur spøl
kl. 14-18 Tilmelding til páskadøgurðan mikud. og døgurðan fríggjadag, tlf. 316491
*Týsdagin 19. mars:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur. Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Miss fyri alt í verðini ikki hugin at ganga, Beinta Danielsen, fysioterapeutur
*Mikudagin 20. mars:*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Høvi er at koma sum gestur.
Túrur
*Hósdagin 21. mars:*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Domino binding
kl. 15-17 Tøtingarhugni í kjallaranum, Ása Hátun og Súsanna í Jákupsstovu
*Fríggjadagin 22. mars:*
kl. 10-13 Matgerð Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði, høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
**Tín** stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**LISA**
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

**MÁF**
*(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)*
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy.
Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Amnesty International, Føroya deild**
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
*Tlf. 315816*
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost:
Amnesty-Amnesty.fo
Skrivstovan er opin:
Mánadag frá kl. 13–17 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
*tlf. 21 04 95.*
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**MBF**
*Íslandsvegur 10C*
*100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 9.00 og 16.00.
Tlf. 317373 · Fax 310813
T-post: mbf@post.olivant.fo

**Giktafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10 C*
*100 Tórshavn*
*Tlf. 310237 · Fax 310813*
T-postur: gikt@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin týs- og hósdag frá kl. 11-14.
Fibromyalgibólkurin hevur opið mánadag frá kl. 11-13.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Alzheimerfelagið**
*Tórsbyrgi 16*
*100 Tórshavn*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102 og t-post:
sigmo@post.olivant.fo
Demenslinjan – er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 – svarar týsdag kl. 18.00-20.00.

**Sinnisbati**
*Íslandsvegur 10 C,*
*100 Tórshavn*
*tlf. 322544 · Fax 310813*
T-postur:
sinnbati@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin mikudag frá kl. 16.00-18.00. Fyrsta mikudag í mánaðinum er opið til kl. 19.30.
Tú ert vælkomin at ringja og spyrja um alt, sum hevur við sinnistrupulleikar at gera á tlf. 322544.

**Javni**
*Hoydalsvegur 40*
*3. hædd (ovast).*
Skrivstovan er opin týs-, miku- og hósdag kl. 9-12. Fríggjadag kl. 13-16.
Tlf. 314827 · fax 310557
email: javni@post.olivant.fo

**Felagið Føroyar-Kuba**
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

**Deyvafelag Føroya**
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 31.7597, fartlf. 22.2381, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Cøliakifelag Føroya**
*Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10C.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til onkran av nevndarlimunum: Annegreta tlf. 448664
Beinta tlf. 310574
Henning tlf. 314783.

**Nýrafelagið**
*Postsmoga 1063*
*110 Tórshavn.*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á
e-mail:
thomsen1@post.olivant.fo
Tlf. 315928, Odny
Tlf. 315786, Karin Elisa
Tlf. 315673, Katrin

**Heilafelagið, MBF-húsið**
*Íslandsvegur 10C*
*tlf./fax 321520*
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Føroya Felag Móti Krabbameini**
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

**Epileptikarafelag Føroya**
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: Týsdag kl. 10.00–11.30 og hósdag kl. 16.00–17.30.
Til ber at tekna seg sum lim og eisini kunnu tit støkka inn á gólvið.
Vit hava ymiskt til sølu so sum bøkur, faldarar, videofilmar, lyklaringar, føðingardagskort og peak flow meter.

**Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark**
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur:
fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mánadag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14-18, fríggjadag stongt.

**Føroyingafelagið í Odense**
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

## KONFIRMANTAR

**Konfirmantar í Vesturkirkjuni 17. mars 2002**

Kristina Hovgaard Clementsen, Ísaksgøta 3, Hoyvík
Nicolina Maria Mortensen, Traðagøta 11a, Argir
Rannvá Poulsen, Borgartún 3, Argir
Nora Maria Ivansdóttir Rubeksen, Velbastaður
Rakul Skaale, Velbastaðvegur 37, Tórshavn
Joan Sørensen, J. Nolsøesgøta 39, Tórshavn
Joan Ejdesgaard Thomsen, Áarrás 8, Argir
Kjartan Festirstein Andreasen, Høvdagøta 6, Argir
Pætur Breckmann, Viðargøta 2, Argir
Trygvi Jacobsen, Leitisgøta 22, Argir
Pætur Torstein Jørgensen, Dungagøta 19, Tórshavn
Eyðun Skarðhamar, Grønlandsvegur 56, Tórshavn

**Konfirmantar í Hvalbiar kirkju á Boðanardegi Mariu 17. mars 2002 kl. 11.00**

John Holm, Hvalba
Hans Cecil Poulsen, Hvalba
Sunleif Eli Dimon, Hvalba
Martin Olsen, Hvalba
Haftór Óli Bragason, Hvalba
Jákup Leo Thorsen, Sandvík
Ári Ákason, Sandvík
Jákup Pauli Sigurheim, Sandvík
Rani Lagfoss, Sandvík
Juanita Schrøter Holm, Hvalba
Lív Michelsen, Hvalba
Beinta Ellendersen, Hvalba
Rebekka Olsen, Hvalba
Kristina Mortensen, Sandvík

## BRÚDLEYP

Í dag, kl. 15.00 giftast í Vesturkirkjuni Sólbjørg Sivertsen, Hvannasund, og Jákup Dahl Olesen, Hoyvík. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, eru vælkomin í Listaskálan kl. 19.00.

Leygardagin 13. apríl kl. 10.30 giftast í Sjóvar kirkju Bogi Kallsberg, Klaksvík og Meinhild Jacobsen, Kolbeinagjógv. Kl. 13 verður borðhald í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tit, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum verða biðin um at siga frá innan 1. apríl á tlf. 447801, 228227 ella 456040.

## GULLBRÚDLEYP

Sunnudagin 17. mars hava Maud og Esmar A. Jacobsen, Tórshavn, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

Týsdagin 19. mars kunnu hjúnini Margith og Nikkel Nielsen á Eiði halda teirra gullbrúdleypsdag. Tey, sum vilja heilsa uppá tey bæði, eru vælkomin í Mizpa á Eiði sama dagin millum kl. 15 og 20.

## 60 ÁR

Týsdagin 19. mars verður Helgi Augustinussen, Vágur, 60 ár. Vælkomst allan dagin.

## 80 ÁR

Týsdagin 19. mars verður Sverri Mortensen, Argir, 80 ár. Føðingardagurin verður hildin hjá soninum í Heiðagøtu7, Argir.

## PRÓGV

Kristianna Poulsen, Klaksvík, hevur tikið prógv sum sunnheitssjúkrahjálpara assistentur í Sunnheitsskúlanum í Keypmannahavn.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 16. mars: Andreas Petersen, tlf. 441086
Sunnudagin 17. mars: Pól Jóhs. í Horni, tlf. 444038

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.



# Klárir til boripallin eftir tveimum vikum

**Á DTL í Aberdeen kanst tú fáa neyðugu útbúgvingina til at fara á ein oljuboripall at arbeiða eftir bert tveimum vikum**

OLJUVINNA
*Heri á Rógvi*

**Aberdeen:** Enn eru føroyingar ikki farnir rættiliga inn í oljuvinnuna. Tað eru eisini rættiliga fáir føroyingar, ið arbeiða á oljuboripallum. Líkamikið á hvørjum boripalli og í hvørjum landi, verður stórur dentur lagdur á trygd, heilsu og umhvørvi. Samstundis er tað eisini arbeiði á opnum havi, sum brýtur eitt sindur frá vanligum arbeiði.

Tískil krevur hetta eina ávísa útbúgving ella venjing, áðrenn farast kann á boripallin at arbeiða.

Á DTL í Aberdeen ber til at fáa neyðuga lærdómin til at kunna arbeiða á einum borpalli.

DTL er ein privatur lærustovnur, ið ein amerikonsk fyritøka eigur. Venjingin gongur fyri seg á økinum hjá DTL í Aberdeen. Á økinum er millum annað ein oljuriggur á landi. Har er tað mesta av útgerðini, sum er á einum oljuboripalli. Boritornið stendur í fullum líki, har næmingarnir fáa møguleikan at virka eins og var tað í Norðsjónum. Tað verður heldur einki gjørt automatiskt, men tað nógva arbeiði fer fram við hond, og teir vera fyri tað nógv bert stuðlaðir av kranum og øðrum, tá hetta er neyðugt. Rættiliga stórur dentur verður lagdur á trygd, heilsu og umhvørvi.

Áðrenn næmingarnir kunnu byrja eitt tvær vikur skeið, skulu teir hava verið á einum trygdarskeiði frammanundan. Hetta skeið tekur einar tveir til tríggjar dagar.

Tað er oljufeløgini, ið senda fólk á skeið hjá DTL, sum eisini hevur aðrar fasilitetir við simulatorunum og aftur.

Fyrr í vikuni vóru føroyskir studentaskúlanæmingar og vitjaðu á DTL.


*Skotin Alan vísir her næmingum runt hjá DTL. Hann hevur áður verið sjómaður og hevur verið nógv í Føroyum*


*Boritornið á DTL er meinlíkt einum hvørjum øðrum boritornið á oljuboripallum*

# Miðvágs fornminnafelag ætlar sær Jansagerði

FORNMINNI
*Tíðindaskriv*

Miðvágs Fornminnafelag sum í nøkur ár hevur arbeitt við at savna myndir, skjøl og annað siðsøguligt tilfar, hevur ætlanir at keypa ognina í Jansagerði í Miðvági, sum nú er lýst til sølu.

Staðið hevur stórt søguligt virði, vegna tað at Prestagarðurin í Vágum stóð har í mong hundrað ár. inntil hann í 1920'unum varð niðurtikin.

Frá 1541 og til nýggi prestagarðurin varð bygdur, hava 26 prestar búð í Jansagerði. Kendast av teimum eru Petur Arabo og Beinta. Eisini er tað prestasonurin Jens Chr. Svabo og kenda verk hansara frá 1781-82 sum vit knýta til Jansagerði.

Til Jansagerði hoyrdi náðinsgarðurin Kálvalíð, sum er eitt tað elsta húsi í Føroyum og nú verður nýtt til savn. Jansagerði og Kálvalíð gjørdust víða kend í skaldsøguni Barbaru hjá Jørgen Frans Jacobsen.

Tað er tí eyðsýnt, at Fornminnafelagið hevur stóran áhuga í ognini sum nú er til sølu. Fyrst og fremt at tað, sum nú er, ikki forferst, og at fáa fornminnini sjónlig og atkomulig. Samstundis kundi Fornminnafelagið nýtt húsini til framsýningar og kvøldsetur.

Nú húsast felagið í kjallaranum í Kommunuskrivstovuni í Miðvági og hevur opið hvørt mánakvøld kl. 19 – 21 vetrarhálvári.


SÝNSMAÐUR

Søkt verður eftir sýnsmanni til Farmadeild okkara.

Arbeiðið er sjálvstøðugt og snýr seg í høvuðsheitum um, at sýna trailarar, ið koma og fara av landinum við skipum okkara.

Søkt verður eftir fólki:
· ið hevur góð samstarvsevni og er nærlagt
· ið kann arbeiða skiftandi arbeiðstíðir
· ið hevur trukkprógv og kennir til trailarar

Arbeiðið er samstarv millum Farmadeildina, OCD og Strandferðsluna.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jónfinn ella Rólant á tel 345960

Umsókn, merkt "Sýnsmaður", verður at senda í seinasta lagi 23. mars 2002 til:

SMYRIL LINE CARGO
Postsmoga 370 • 110 Tórshavn

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn, deildir í Hanstholm, Bergen, Reykjavík og Lerwick. Síðan 1983 hevur MF Norröna, ið hevur pláss til 1.050 ferðafólk og 300 bilar, silgt millum Norðanlond. Vegna vaksandi talið av ferðafólkum byggir Smyril Line nýtt skip, sum verður sett í sigling á várið 2003. Nýggja Norröna verður 30.000 BRT og hevur pláss til 1.500 ferðafólk og 800 bilar.
Smyril Line eigur harafturat Hotel Føroyar, Vallaraheimið Tórshavn og sluppina "Norðlýsið".

team85



